

*Monika Stauss Joensen og Nikos Kapnas eru úr ávikavist Sveits og USSR. Tey búgva í Føroyum og eru væl kend nøvn í føroyska tónleikalívinum*

# Stauss og Kapnas fara á konsertferð

**Í kvøld verður konsert í Nólsoyar skúla, 2. hvítusunnudag í Haldarsvíkar kirkju, og týskvøldið komandi verður konsert í Norðurlandahúsinum**

KONSERTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á konsertferðini fara Monika Stauss Joensen og Nikos Kapnas, sum saman mynda eina altjóða tónleikamynd, at framføra tónar úr barok-tíðini og tí sokallaðu klassisku tíðini, sum Mozart livdi í.

Skráin er sera áhugaverd við verkum eftir eitt nú F.H.Hoffmeister, J. Pleyel, L. Spohr og J.S. Bach.

Monika og Nikos spæla duettir fyri tvær violinir, violin og viola, og eisini fer Nikos at spæla eina solo-partita fyri viola, sum upprunaliga er skrivað fyri cello.

Samanumtikið kunnu vit siga, at talan er um áhugaverdar konsertir við kamartónleiki.

### Byrja í kvøld

Ætlandi skuldi ein av konsertunum hjá Moniku og Nikos verða í Fríðrikskirkjuni á Toftum seinasta sunnudag, men vegna serligar umstøður varð hendan konsertin avlýst.

Í staðin fara tey bæði at spæla til eina tónleikagudstænastu í Haldarsvíkar kirkju 2. hvítusunnudag, har deknurin prædikar.

Fyrsta konsertin verður longu í kvøld í Nólsoyar skúla klokkan 19.30. Onnur í røðini verður í Haldarsvíkar kirkju 2. hvítusunnudag klokkan 11, og hetta verður ein tónleikagudstænasta. Triðja og seinasta konsertin á hesum sinni verður í Norðurlandahúsinum komandi týskvøld klokkan 19.30.

### Stauss og Kapnas

Nikos Kapnas er føddur í Tashkent, USSR, har hann byrjaði sína tónlistarligu yrkisleið. Hann endaði útbúgving sína í Thessaloniki í Grikkalandi, Antwerpen og Brússel. Ì meira enn 16 ár spældi hann í belgiska útvarps -og sjónvarpsorkestrinum.

Monika Stauss Joensen er fødd í Zúrich, Sveits og byrjaði at spæla violin longu sum sjey ára gomul. Hon hevur sína útbúgving bæði úr Sveits og Jugoslavia. Seinni tók hon tvey diplom hjá the Royal School of Music í London.

Monika og Nikos hava búsett seg í Føroyum og eru væl kend nøvn í føroyska tónleikalívinum. Umframt at tey bæði eru virknir tónleikarar, hava tey undirvíst sum lærara í Føroya Musikkskúla í fleiri ár.

Hetta er fyrstu ferð, at tey bæði eru á konsertferð saman.

### Øll vælkomin

Tað er Konsertfelagið saman við Norðurlandahúsinum, sum standa aftan fyri konsertirnar hjá Moniku Stauss Joensen og Nikos Kapnas.

Atgongumerki á 60 kr. fáast við dyrnar í Nólsoyar skúla og í Norðurlandahúsinum.

Næmingar hava ókeypis atgongd.

Øll eru hjartaliga vælkomin at lurta eftir hesum báðum úrmælingunum á tónlistarliga økinum.



*Í kvøld klokkan 19.30 verður fyri fyrstu ferð høvi at hoyra Moniku Stauss Joensen og Nikos Kapnas spæla saman á palli. Konsertin í kvøld verður í Nólsoy, og gott samband er út um fjørðin við Rituni fyri konsertina og innaftur eftir konsertina*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Norðborg gongur á odda:

# Sjálvvirkandi íl[...] fólk við flakama[...]

**Amerikumenn eru í løtuni umborð á Norðborg við nýggjari tøkni til svensku vmkskerimaskinurnar. Endamálið er, at neyðugt ikki longur skal vera at hava fólk standandi við maskinunar og venda fiski í skálunum**

TØKNI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heilt aftur til miðskeiðis í áttatiárunum, tá ið svensku vmk-skerimaskinurnar vórðu settar umborð á føroysk svartkjaftaskip, hevur verið neyðugt at hava fólk standandi við hesar maskinur. Hesar maskinur vórðu upprunaliga bygdar til skering av sild og seinni eisini lagaðar til svartkjaft.

Maðurin ella kvinnan, sum stendur við maskinuna, hevur til uppgávu at syrgja fyri, at fiskurin, sum dettur oman á skálirnar og síðan fer til skeringar, vendir ræattan veg. Vanliga kemur allur fiskurin eftir høvdinum oman á skálirnar, men onkur fiskur vendir øvut. Fer fiskurin á skeivari síðu í maskinurnar, hongur flakið saman um búkin – og ikki um ryggin, tá ið talan er um sonevndu butterflyfløkini.

Er talan um farsframleiðslu, er vandi fyri, at innvølur kann enda í farsinum, um fólk tá ikki eisini standa við skrædlaran og taka skeivt skornu fløkini frá.

Soleiðis var tað í áttatiárunum, tá ið føroyingar lótu nýggj verksmiðjuskip byggja til at virka svartkjaft til matna.

### Meira rationelt

Enn í dag eru hesar somu vmk-skerimaskinur grundarlagið undir teirri svartkjaftaog sildaframleiðslu, sum er umborð á okkara verksmiðjuskipum.

Umborð á Atlantic Navigator, har høvuðsframleiðslan er surimi, eru 16 skerilinjur, og umborð á Norðborg, sum framleiðir matvørur, eru seks maskinur.

Nýggja skipið, sum ætlandi kemur í flotan fyri Norðborg um eini tvey ár, fer eisini at hava vmkskerimaskinur sum grundarlag undir síni framleiðslu av eitt nú sild og svartkjafti.

Felags fyri arbeiðsgongdina umborð á hesum skipum er, at neyðugt hevur verið at hava eitt fólk standandi við hvørja av hesum maskinum.

Men nú bendir mangt á, at hetta skjótt verður søga.

### Nýggj tøkni

Amerikumenn hava nevniliga ment eina skipan við sjálvvirkandi ílegging av fiskinum, soleiðis at neyðugt ikki longur verður at hava fólk standandi við maskinurnar og venda fiski, sum vendir øvut.

Jón Rasmussen, sum er



# Hevur onga avgerð tikið

BORGARSTJÓRI
*Vilmund Jacobsen*

Í eina tíð hevur ljóðað, at borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, hevur havt ætlanir um at leggja frá sær sum borgarstjóri.

Herfyri segði hann seg frá sum formann í Kommunusamskipan Føroya (KSF). Grundgevingarnar vóru, at arbeiðsbyrðan í Runavíkar kommunu, sum nú telir 14 bygdir, er vorðin so stór. Eisini vísti hann á, at hann hevur verið við til at gjørt stórar vinnuligar íløgur, sum eisini krevja nakað av honum. Aftrat hesum eru stórar og týðandi uppgávur at loysa í KSF.

### Eingin avgerð

Spurdur, um hann eisini ætlar sær at gevast sum borgarstjóri, sigur Rodmundur Nielsen:

– Tað er eingin loyna, at eg havi umhugsað støðuna, men í løtuni havi eg onga avgerð tikið um at leggja frá mær.

Tað hevur eisini ljóðað, at Hans Petur Ellingsgaard, býráðslimur, sum í seinastuni hevur selt burtur av sínum vinnuvirksemi, væntandi verður eftirmaðurin, um Rodmundur Nielsen leggur frá sær.

Men, sum skilst, hevur borgarstjórin í Runavíkar kommunu ikki tikið støðu til at leggja frá sær.



*Rodmundur Nielsen, borgarstjóri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*